


*- Í 2015 skal samlaða ferðatíðin úr øllum økjum landsins til høvuðsstaðarøkið í mesta lagi verða ein tíma frá teimum støðum, har landafast er – og í mesta lagi hálvan triðja tíma, har tað ikki er landafast. Tað sigur strategibólkurin, sum hevur sett sær visjónir um infrakervið*

# Lættari at flyta seg og minni kostnaður

**Menning og trivnaður í Føroyum skulu ikki avmarkast av forðingum fyri at flyta seg stað úr staði. Infrakervið skal verða soleiðis háttað, at tað er lætt, ferðslutrygt og ódýrt hjá øllum at flyta seg millum ymisk støð, bæði innanlands og millum Føroyar og útheimin**

INFRAKERVIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Niels Winther, formaður í strategibólkinum um infrakervið, sum hevði framløguna á visjónstorginum í síðstu viku.

Hann vísti á, at bólkurin hevur orðað eina visjón, ið fevnir um eitt høvuðsmál – og trý atlit, sum hann tók til.

– Høvuðsmálið er framkomiligheit og tey trý atlitini eru 1) ferðslutrygd, 2) umhvørvi og 3) nyttuvirði fyri samfelagið.

Samferðsluætlanin, sum bólkurin hevur sett út í kortið, snýr seg um skip, vegir, havnir og flogvallir – og soleiðis er eisini ein ætlan fyri fígging av hesum.

Niels Winther segði, at høvuðsmálið við einum góðum infrakervi er at betra um framkomiligheitina.

– Men neyðug atlit mugu samstundis takast til, hvussu betrað framkomiligheit ávirkar ferðslutrygdina, umhvørvið og samlaða nyttuvirðið fyri samfelagið, legði hann aftrat.

## Innanlands

Um infrakervið innanlands, sigur strategibólkurin, at forðingarnar fyri at flyta seg úr stað í stað alsamt skulu minka hjá øllum – og í øllum økjum landsins.

– Í 2015 skal samlaða ferðatíðin úr øllum økjum landsins til høvuðsstaðarøkið í mesta lagi verða ein tíma frá teimum støðum, har landafast er – og í mesta lagi hálvan triðja tíma, har tað ikki er landafast.

Málið er, at flesibiliteturin skal betrast, soleiðis at til ber at ferðast, tá ið tørvur er á tí.

– Har tað er tekniskt gjørligt og búskaparliga skilagott, eigur fast samband at verða gjørt, og har ferju-og/ella tyrlusamband er, eigur títtleikin at økjast.

Strategibólkurin heldur, at kollektiva ferðslan skal verða soleiðis háttað, at gjørligt er at nýta hana sum eitt reelt alternativ til persónbilin, tá ið ferðast verður millum ymisku økini í landinum.

## Uttanlands

Visjónin hjá strategibólkinum er eisini, at ferðakostnaðurin millum Føroyar og útheimin alsamt skal minka, og soleiðis skulu avgjøldini á uttanlandsferðing verða burtur í 2015.

– Flogvallarviðurskiftini og flogferðsluviðurskiftini skulu verða soleiðis háttað, at tey stimbra smidligar og ódýrar flutningsmøguleikar, og møguleikar skulu verða fyri kappingarførum loftvegis farmaflutningi.

Strategibólkurin leggur upp til, at havnakapasitetur og umstøðurnar á havnunum annars skulu vera soleiðis, at ongar forðingar eru fyri innog útflutningi av vørum.

– Hetta skal stimbra upp undir møguleikarnar at bjóða Føroyar fram sum ein tilfeingismiðdepil, sigur bólkurin.

## Trygd og umhvørvi

Allar verkætlanir í infrakervinum skulu fremjast við atliti til ferðslutrygdina, og ferðslutrygdin skal soleiðis eisini hugsast inn í design av veganetinum.

Bólkurin miðjar eftir, at talið á ferðsluóhappum við persónsskaða í 2015 verður minkað við 30% í mun til talið í dag.

Væntandi er, at ferðslan i hesum tíðarskeiði við nýggjum sambindingum millum oyggjar, eitt nú við undirsjóvartunlum, fer at veksa eini 25-30%.

– So, hetta er eitt ambitiøst mál at seta sær, heldur bólkurin.

Á umhvørvisøkinum skulu atlit takast til náttúru, mentanararv og estetikk, tá ið infrakervið verður útbygt ella broytt.

– Betrast skal um ferðaupplivingina, og í 2015 skal ein skipan við serligum ferðafólkarutum og súkklurutum verða virkin.

Bólkurin hevur eisini sett sær fyri, at álvarsligastu trupulleikarnir við óljóði frá ferðsluni skulu loysast, eins og globala ávirkanin av útláti frá ferðsluni skal minkast.

– Í 2015 skal útlátið av vakstrarhúsgassum frá ferðsluni verða 10% minni enn í dag, sigur bólkurin.

## Nyttuvirði

Í visjónsætlanunum um infrakervið hevur strategibólkurin sett sær fyri, at íløgur í kervið sum høvuðsregla bert skulu fremjast, um fyrimunirnir fyri samfelagið eru størri enn vansarnir, herundir eisini kostnaðurin.

– Fíggingin av infrakervinum skal skipast soleiðis, at samfelagsbúskaparliga úrslitið verður tað best møguliga.

Strategibólkurin mælir til, at ein greið raðfesting av íløgum í infrakervið verður gjørd.

- Arbeiðast skal effektivt við verkætlanunum – og við so lítlum samfelagsbúskaparligum oyðsli sum gjørligt, segði Niels Winther undir framløguni.

## Ókeypis koyring og sigling:

# Bert Havnin su

**– Í miðal brúkar Smyril bert eini 10% av tí ferðafólkakapasiteti, sum skipið hevur. Við farminum er prosentparturin nakað størri. Eg dugi tó ikki at ímynda mær, at Smyril hevði verið ov lítil tey næstu árini, hóast øll ferðing land-og sjóvegis var ókeypis, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins**



INFRAKERVIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kjakinum eftir framløguna hjá Niels Winther, formanni í strategibólkinum um infrakervið, helt Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at alt eigur at vera við máta.

– Skal øll ferðing, bæði á landi og á sjógvi, gerast ókeypis, verður neyðugt við nýggjum ferjum og víðari tunlum.

Hann helt ikki, at veganetið í Føroyum er útbygt til, at øll ferðsla verður ókeypis, nú vit hava fingið Vágatunnilin og Norðoyatunnilin.

– Fløskuhálsar høvdu ført til eykaútreiðslur fyri samfelagið, helt Bárður Nielsen.

## Bert Havnin

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki, sum er limur í strategibólkinum um infrakervið, var ikki samdur við Bárði Nielsen.

– Tað er bara í Havnini, at vit høvdu fingið kapasitetstrupulleikar á vegunum, um øll koyring var ókeypis. Aðrastaðni hevði veganetið megnað ferðsluna, sum hevði staðist av hesum, segði hann.

Jóannes Ejdesgaard, løgmaður, var ikki samdur við Bárði Nielsen.

Løgmaður helt tað ikki vera skilagott at bremsa mobilitetinum, sum hann tók til.

– Eg haldi, at tess størri mobiliteturin í samfelagnum er, jú betri er tað.

Jóannes vísti á, at tá ið tiltøk eitt nú eru í høvuðsstaðarøkinum, er rættiliga ymiskt, hvussu nógv føroyingar, sum koma úr ymsum heraðshornum, mugu gjalda fyri at náa hesi tiltøk.

– Eg veit, at gjald fyri koyring gjøgnum undirsjóvartunlarnar var fyritreytin fyri, at vit fingu hesar nú.

Løgmaður segði seg annars undrast yvir, at viðskiftafólk hjá Strandfaraskipum Landsins, sum hava farmaflutning, ikki kunnu bíleggja sær pláss í góðari tíð.

– Hetta er mær vitandi møguligt alla aðrastaðni í heiminum, legði hann aftrat.

Kristian Davidsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins, vísti á, at nýggi Smyril er ríkiliga stórur, um givið var leyst fyri ókeypis flutningi um land og hav.

– Í miðal brúkar Smyril bert eini 10% av tí ferðafólkakapasiteti, sum skipið hevur. Við farminum er prosentparturin nakað størri. Eg dugi tó ikki at ímynda mær, at Smyril hevði verið ov lítil tey næstu árini, hóast øll ferðing land-og sjóvegis var ókeypis.

Kristian legði aftrat, at gjørdist Smyril kortini ov lítil, hevði Suðuroyggin í øllum førum ikki havt nakað "problem", sum hann tók til.

Óla Jákup í Dímun helt, at ein gongd leið at útjavna prísirnar á flutningi kanska kundi verið ein meira solidarisk skipan, har øll gjalda tað sama – líkamikið, um tey ferðast stuttan ella langan veg.

Kai Leo Johannesen, løgtingsmaður, nam við spurningin, sum strategibólkurin umrøður við atliti til vakstrarhúsgass, ið stendst av ferðsluni.

Løgtingsmaðurin undraðist yvir, at bólkurin bert nevnir útlátið, sum stavar frá ferðsluni.

Málið, sum bólkurin hevur sett sær, er, at útlátið av vakstrarhúsgassum frá ferðsluni í 2015 skal verða 10% minni enn í dag.

– Men hvussu við útláti frá skipum og øðrum, spurdi Kaj Leo Johannesen.

Svarið, sum løgtingsmaðurin fekk, var, at strategibólkurin í hesum førinum bert arbeiðir við infrakervinum – og ikki við

### FAKTA

**Í strategibólkinum um infrakervið eru hesi umboð:**
Niels Winther, formaður
Olga Biskupstø
Oyvindur Brimnes
Kristian Davidsen
Kitty May Ellefsen
Randi Frederiksberg
Hjørdis Gaard
Joel Undir Leitinum
Finnbogi Niclasen